# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Andlát og jarðarferðir

**Lina Høgnesen, Klaksvík**, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin, 81 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjunimánadagin kl. 14. Tey, ið vilja vilja minnast Linu kunnu lata Norðoya Ellis- & Røktarheimi eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

**Emma Joensen**, vanliga nevnd Emma hjá Petur Hans, andaðist á Eldrasambýlinum í Vági fríggjadagin, 87 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju týsdagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Emmu kunnu lata Eldrasambýlinum í Vági eina gávu.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður mín

**Kjeld Holmstrup**
ættaður frá Hanstholm
búsitandi í Ålborg

andaðist 26. apríl, 54 ára gamal.

**Karin Simonsen**

## Tøkk

Vit vilja takka øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá góði maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Sonni Olsen**
Eiði

andaðist og var borin til jarðar.
Takk, Emil prestur, fyri troystarrík orð, tøkk, kirkjutænarar, sangarar og gravarar.
Eina stóra tøkk til Vitan, sum sang yvir børuni, og eina serstaka tøkk til Jóhannu fyri ervið á Hotell Eiði .
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvílistað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Katrin, Karstin, Heidi, Vilbjørg og Jóhannus Einar við fam.**

**Dagurin**
**27. apríl. Ánanias,** deyður ár 375. Kristin munkur, sum varð tikin av døgum í Persia. Summir halda, at her er talan um tann Ánanias, sum er umtalaður í Ápostlasøguni 9, 10-19. Fríðrikur Petersen próstur doyði hendan dagin í 1917.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# Próvtøka hjá heilsuhjálparum



Fríggjadagin 3. apríl 2009 fingu heilsuhjálparar handað prógv á Heilsuskúla Føroya í Suðuroy.
**Aftara rað f.v.:** Eyðhild Vilhelm, Vágur, Torgerð Petersen, Vágur, Katrin Hansen, Haldórsvík, Andrea G. Danielsen, Sumba, Helena R. Eliasen, Tórshavn, Magda S. Guttesen, Sørvágur, Marjun Olsen, Porkeri, og Elin Christiansen, Klaksvík.
**Fremst f.v.:** Edith H. í Trøðini, Nes- Vágur, Vivian Müller, Vágur, Birgith Fuglø, Klaksvík, Eiley H. Weihe, Sørvágur, og Erika Knudsen, Strendur.

# Vatnlitsmyndir í Stephanssons húsi

Fríggjadagin 24. apríl varð fernisering í Stephanssons Húsi í Havn í sambandi við eina framsýning hjá Kari Roarsdóttir Nilsen

Á framsýningini eru 29 vatnlitsmyndir. Framsýningin hevur heitið "Djór, fólk, fantasiverur, stemningur, náttúrulýsingar, tankar og dreymar". Nakrar av myndunum eru í lesibókini »Hervør og Høgni í triðja«, sum Føroya Skúlabókagrunnur gav út í heyst, og onkrar eru í Míni Jólabók 2006, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út.

Kari Roarsdóttir Nilsen er norsk. Hon hevur búð í Føroyum í 20 ár og arbeiðir hjá býargartnaranum í Tórshavnar kommunu.

Kari hevur altíð havt áhuga fyri at tekna og mála. Hon hevur verið við á fleiri framsýningum, bæði sum sjálvstøðug og saman við øðrum.

Opið er gerandisdagar frá kl. 9-16. Framsýniningin verður opin til og við Dýra biðidag tann 8. mai.

*mg*



*Kari Roarsdóttir Nilsen hevur í hesum døgum listaframsýning í Stephanssons Húsi*
*Mynd: Stephanssons Hús*

## 35 ára føðingardagur



Tann 3. mai verður Solina Jacobsen 35 ár. Dagurin verður hildin 2. mai kl. 19.00 í Samljóð í Skopun við einum drekkamunni.

